# Nøvn

## Andrea Lervik í Fuglafirði 65 ár

Andrea er ættað av Eiði, dóttur Guðrun og Jóanes á Forðunum.Trý systkin átti hon, Katriin, Hanus og Annfinn.Síðstnevndi fórst í vanlukku í bestu árum. Ið var ein dyggur smeitur fyri alla familjuna.

Eftir at hava gingið í barnaskúlanum á Eiði, t.e. í 1961, fór Andrea til Fuglafjarðar at ganga í framhaldsskúla, ið tá varð kallaður preliminerskúli. Hon átti tvær fastrar í Fuglafirði, Kristiannu - og Mathildu Hansen, umframt abban Andreas Hammer, ið búði hjá Mathildu og Andrew.Andrea kom at búgva hjá Kristionnu og Hans Davidi, tey árini hon var í Fuglafirði, og varð sum eitt av systkjunum har í húsinum.

Væl gekst við skúlagongdini, og hon fall væl til í Fuglafirði. Hennara lætta og sjarmerandi lyndi gjørdi, at hon eftir stuttari tíð kom at kenna nógv fólk í bygdini. Í 1964 tók hon preliminerprógv.

Hon arbeiddi í mong ár á handils – og frystivirkinum í Fuglafirði. Hon var røsk og dugnalig – eitt álitisfólk, ið var nógv avhildin av sínum starvsfeløgum.

Nakað væl seinni tók Andrea ta avgerð, at hon skuldi fáa sær eina útbúgving.Í 1986 fór hon á HF - skeiði við Gøtugjógv, og í 1988 varð hon liðug við ta útbúgvingina. Stutt eftir tað, fór hon á sjúkrasystraskúlan í Havn og tók prógv í 1992.

Starv fekk hon á Sjúkrahúsinum í Klaksvík, og har hevur hon starvast síðani. Hon hevur verið sera væl nøgd við arbeiðið í Klaksvík, og hon hevur bert rósandi orð at siga um tey, ið har starvast.



Í 1984 stillaði Andrea upp til býgdaráðsval í Fuglafirði og varð hon vald. Hennara nærlagni og dugnaskapur, saman við góðu evnunum at duga at samstarva, gjørdi, at hon fekk væl av skafti. Hon varð afturvald og sat tríggjar setur, t.e. 12 ár í býráðnum. Andrea hevði áhuga fyri øllum samfelagsmálum. Eiit av málunum, hon brendi fyri, var gerð av barnagarði í Fuglafirði. So løgið tað ljóðar, vóru tað sterkar kreftir í bygdini og landspolitikkarar, ið arbeiddu móti nevndu ætlanin, og ikki altíð varð farið fram við mýkindum. Langt um leingi eydnaðist tað at fáa barnagarðin bygdan. Andreusa partur lá ikki eftir. Allir fuglfirðingar mugu í dag ásanna, at avgerðin um byggingina var røtt, bygdin ella býurin , kann ikki verða barnagarðin fyri uttan.

Andrea giftist við Teodor Lervik úr Leirvík, sonur Janu og Edmund Lervik. Tey fingu sonin Boga, ið saman við konu síni Dianu og dóttrini Guðrun búgva á Kambsdali.

Andrea var og er familjukær. Sum yngri vitjaði hon nógv heimbygdina Eiði, hon helt nógv av sínum foreldrum og allari sínari familju har norðuri.

Hóast 65 ár, so sæst eingin aldur á Andreu. Hon er framvegis løtt av lyndi, arbeiðssom, fylgir væl við øllum tí, ið hendir í okkara samfelag, og er altíð til reiðar at skifta orð um dagsins mál.

Vit eru mong, sum við hesum fáu orðum ynskja tær Andreu hjartaliga til lukku við teimum 65 árunum og vóna at tú fært mong góð og rík ár aftrat.

**Skyldfólk og vinfólk**

# Kjak



**Bogi Andreasen**
*varaborgarstjóri*
*Tjóðveldi*

## Nú kemur spælistaðið

Tórshavnar býráð hevur í íløguætlanini fyri í ár sett hálvaaðru millión krónur av, so gongd kemur á arbeiðið at gera spælistað í Reinsaríinum. Hetta kemur at geva livandi tónleikinum nýggjar karmar og møguleikar

Eitt mál, ið hevur verið ávegis síðstu árini, fer nú í gongd. Tórshavnar býráð hevur í íløguætlanini fyri 2011 sett hálvaaðru millión krónur av til nýtt spælistað á Reinsaríinum, og á býráðsfundi hóskvøldið vórðu játtaðar 450.000 krónur til sáttmála um prosjektering, eftirlit og byggileiðslu.

Hetta er bara fyrsta stigið av trimum, og tað næsta stóra stigið í hesum arbeiði verður at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku, so nú er henda spennandi verkætlan av álvara farin av bakkastokki. Vit síggja fram ímóti at fáa eitt gott spælistað, ið skal vera karmur um livandi tónleik, samstundis sum tað verður náttúrligur partur av mentanarliga umhvørvinum í Tórsgøtu.

Arbeitt verður eftir einum uppskoti frá Majfinni Norðoy, arkitekti, og sær henda ætlan veruliga áhugaverd út. Ein náttúrligur partur av allari tilgongdini verður, at vit sjálvandi fara at samskifta við tónleikarar og onnur, so vit kunnu fáa sum mest burtur úr hølunum.

Talan er um eina søguligan bygning, sum tí er rættiliga áhugaverdur at fáa blást nýtt lív í. Hetta er eitt av gomlu pakkhúsunum í søguligu Havnini, men við ætlanini at brúka tað sum spælistað, fáa vit vónandi blást nýtt lív í, so her kann verða skrivað nýggj søga í komandi tíðum.

Ítøkiliga er ætlanin at innrætta niðastu hæddina til spælistað í hesum árinum, og eingin ivi er um, at hetta spælistað kann fremst av øllum gerast eitt stað, ið veruliga kann fáa tónleikin at blóma. Tí er talan um eina støðu, har allir partar gerast vinnarar.



**Ingeborg Vinther**
*forkvinna*
*Føroya Arbeiðarafelag*

## Opið bræv til Kaj Leo Johannesen, løgmann

Kanst tú greiða føroysku fakfeløgunum frá, hvussu tað fer at bera til at halda tær skyldur, sum álagdar eru í arbeiðsumhvørvislógini, nú 4½ starv verða niðurløgd harímillum 2 týðandi verkfrøðingastørv, sum hava røkt nakrar av teimum tyngstu uppgávurnar á stovninum

Í útvarpinum er løgmaður endurgivin fyri at siga at tær sparingar, sum Jóhan Dahl hevur sett í verk innan arbeiðsumhvørvisøkið eru *gjørdar á lógligan og fullgóðan hátt.*

Hesi úttalilsi eru rættuliga einkisigandi, tí tað sum er avgerandi fyri bæði vinnuna og vanliga løntakaran er, um løgmaður kann tryggja okkum hvussu samanlagdi stovnurin ítøkjuliga kann koma at røkja allar lógarkravdu uppgávurnar, nú kr. 730.000,00 verða skarvaðar av játtanini til Arbeiðseftirlitið, umframt tær sparingar, sum seinnu árini longu eru framdar innan hetta økið.

Í staðin fyri at blástempla alt tað, sum landsstýrisumboðini fremja, so eigur tað at vera skylda løgmans alment at greiða føroysku løntakarunum frá:

- á hvørjum grundarlag hann kann siga, at alt verður gjørt á lógligan og fullgóðan hátt.
- um løgmaður kann vissa okkum um, at samanlagdi stovnurin kemur at kunna røkja allar tær uppgávur, sum lógin áleggur Arbeiðseftirlitinum at loysa,
- ítøkjuliga hvussu ætlanin er at røkja hesar uppgávur við skerdari játtan og starvsfólkatali.